Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

NOVEMBER 2020

# Fíggjarligt støðufesti

## 3. ársfjórðing 2020

### Eftirspurningurin eftir fígging hevur ikki verið stórur meðan Covid-19 hevur gjørt um seg í Føroyum; fyritøkurnar hava trekt uppá gjaldførið, og fíggjarstøðan hjá húsarhaldunum er góð.

Samlaða innlánsyvirskotið í føroysku peningastovnunum er 5 mia. kr. í september 2020 (Mynd 1). Her eru útlendskir kundar hjá føroysku peningastovnunum taldir við. Útlánini eru 19,8 mia. kr. tilsamans meðan innlánini eru 24,8 mia. kr. (saldo ultimo september 2020).

Tá talan er um inn- og útlán til føroyskar kundar einans, eru útlánini 15,7 mia. kr. tilsamans og innlánini 17,2 mia. kr. Hetta gevur eitt innlánsyvirskot á 1,5 mia. kr. í føroysku peningastovnunum (saldo ultimo september 2020).

*Mynd 1. Innlánsyvirskot*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Innlánsyvirskot í føroyskum peningastovnum. Millumbanka inn- og útlán eru ikki íroknaði.*

Tað eru í størsta mun húsarhaldini, sum hava innlánsyvirskot í føroysku peningastovnunum. Vinnan og kommunurnar hava størri skuld í bankunum, enn innistandandi. Húsarhaldini hava umframt skuld í føroysku bankunum, sethúsalán í donskum realkredittstovnum. Um skuldin hjá húsarhaldunum til donsku realkredittstovnarnar verður tald við, hava húsarhaldini eitt innlánsyvirskot á 233 mió. kr. við endan av triðja ársfjórðingi 2020.

Útlánsvøksturin hjá føroysku peningastovnunum er framvegis lágur. Útlánsvøksturin er 1% við endan av triðja ársfjórðingi. Vøksturin í útlánunum frá donsku realkredittstovnunum er hinvegin stórur; hann er 19% við endan av triðja ársfjórðingi (Mynd 2).

*Mynd 2. Útlánsvøkstur*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Ársvøkstur í útlánum frá føroyskum og donskum peninga- og realkredittstovnum til føroyskar kundar í %, 3 mðr. glíðandi miðal. Millumbanka útlán eru ikki íroknaði.*

Vøksturin í útlánunum hjá realkredittstovnunum hevur drigið samlaða útlánsvøksturin hjá føroysku og donsku peningastovnunum til føroyskar kundar tilsamans upp, so samanlagdi útlánsvøksturin var 4% við endan av triðja ársfjórðingi 2020.

Tað er ymiskt, hvussu nógvan tøkan pening vinnurnar hava á bók. Gisti- og matstovuvinnan, ið er ein av harðast raktu tænastuvinnunum vegna Covid-19, hevur lutfalsliga lítið av tøkum peningi á bók (Mynd 3).

Hinvegin hava aðrar tænastuvinnur sum eitt nú heil- og smásøla, og flutnings- og goymsluvinnan, ið somuleiðis vórðu raktar tá samfelagið lat aftur, í størri mun tøkan pening í føroysku peningastovnunum. Byggivinnan og fiskivinnan hava somuleiðis lutfalsliga nógvan tøkan pening á bók. Sæð í mun til stuttfreistaða skuld (kassakreditt í føroysku peningastovnunum), eru tær nevndu vinnurnar munandi betri fyri, enn gisti- og matstovuvinnan. Hetta hongur millum annað saman við, at gisti- og matstovuvinnan er ein lutfalsliga nýggj vinna, ið millum annað av hesi orsøk ikki tykist at vera eins væl konsolideráð, sum hinar.

Hóast vøksturin í útlánunum til vinnuna sum heild hevur verið lágur, hava útlánini til gisti- og matstovuvinnuna, flutnings- og goymsluvinnuna, umframt fastogn (millum annað íløgur í gistihús), verið veksandi seinastu árini og er framvegis tað. Í triðja ársfjórðingi hevur útlánsvøksturin ligið um 10% til bæði fastogn og flutnings- og goymsluvinnuna, og um 30% til gisti- og matstovuvinnuna. Vøksturin í útlánum frá føroyskum peningastovnum til føroysku vinnuna undir einum, er 2% við endan av triðja ársfjórðingi 2020.

*Mynd 3. Innlán og kassakredittur hjá ymsum vinnugreinum.*




*Kelda: Landsbanki Føroya.*

At útlánsvøksturin er lágur noyðist ikki at vera tí peningastovnarnir halda aftur í sínum útlánum, men hinvegin, at eftirspurningurin eftir fígging ikki er stórur. Fíggjarstøðan hjá føroysku húsarhaldunum er sambært peningastovnunum góð; tey hava stór frívirði í sethúsunum og innlán í bankunum, og hava tí møguliga ikki stóran tørv á at læna pening.

Somuleiðis er er fíggjarstøðan hjá størsta partinum av føroysku vinnuni góð, hóast fyritøkur innan serliga ferðavinnu og gisti- og matstovuvinnu, hava mist stóran part av umsetninginum seinasta hálva árið. Umframt hjálparpakkarnir, sum veittu inntøkustuðul til heimsendar løntakarar og fíggjarligan stuðul til fastar útreiðslur hjá fyritøkum, er avrokningin av MVG og gjaldsfreistin at rinda tollkreditt longd. Hetta hevur styrkt um gjaldførið hjá vinnuni, og er væntandi ein av orsøkunum til, at vinnan ikki hevur eftirspurt meira fígging enn vanligt, hóast Covid-19 hevur gjørt um seg í Føroyum.

Flestu føroysku fyritøkurnar tykjast at vera væl konsolideraðar, soleiðis at tær møguliga hava havt uppspardan pening at nýta burturav seinasta hálva árið. Fallið í innlánunum hjá vinnuni í mars og apríl mánað 2020 bendir á, at fyritøkurnar hava trekt uppá gjaldførið vegna mistan umsetning, tá stórur partur av samfelagnum lat aftur. Føroysku peningastovnarnir hava harafturat bjóðað avdráttarskáa og eyka gjaldførishjálp til húsarhald og vinnu.

Tað eru í størri mun fyritøkurnar, enn húsarhaldini, sum hava tikið av tilboðnum um skáa, men avdráttarskái er ikki nýttur í merkisverdan mun hesar seinastu mánaðirnar, hvørki av húsarhaldum ella vinnu.

*Mynd 4. Innlán hjá vinnuni*




*Kelda: Landsbanki Føroya. Innlán hjá føroyskum ikki-fíggjarligum fyritøkum í føroysku peningastovnunum.*

Peningastovnarnir fingu í mars mánað lækkað eitt av kapitalkrøvunum, ið verður rópt systemiski buffarin[1], soleiðis at peningastovnarnir hava meira tøkan pening til útlán[2]. Higartil hava peningastovnarnir ikki havt týdningarmikil tap av hvørki fyritøkum ella húsarhaldum vegna Covid-19. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at føroyski búskapurin er komin væl ígjøgnum fyrsta umfarið av Covid-19 samanborið við onnur lond. Ferðavinnan er enn lítil í Føroyum og restin av útflutningsvinnuni hevur klárað seg lutfalsliga væl, hóast prísfall hevur verið í nøkrum vørubólkum. Enn eru útlitini tó óviss.

Gjaldførið hjá landinum hevur í triðja ársfjórðingi ligið um 4,5 mia. kr., ið er umleið 1,6 mia. kr. omanfyri minstagjaldførið.

[1] Eginpeningurin hjá peningastovnum er settur saman av solvens og kapitalbuffarum, har systemiski buffarin er ein av hesum. Endamálið við hesum buffara, er at økja mótstøðuførið hjá føroysku peningastovnunum mótvegis stóru sveiggjunum í føroyska búskapinum.

[2] Støða verður ikki tikið til hvørt systemiski buffarin skal hækka aftur, fyrr enn í 2021. Um so er, verður freist á 12 mánaðir givin peningastovnunum til at lúka økta kravið.

Landskassin tók í juni mánað lán á 1,6 mia. kr. til at fíggja møgulig hall á fíggjarlógini í 2020 og 2021, ið kunnu standast av øktum útreiðslum og lægri inntøkum í sambandi við Covid-19. Gjaldførið hjá landskassanum lá um 500 mió. kr. omanfyri minstagjaldførið við ársenda 2019. Sostatt kann sigast at landskassin hevur trekt umleið 500 mió. kr. av gjaldførinum serliga orsakað av Covid-19.

Landskassaskuldin hækkaði við lántøkuni í juni úr 3,7 mia. kr. til 5,3 mia. kr. Landskassaskuldin er í 2020 26% av BTÚ.

Ratingfyritøkan Moody's gav í august 2020 Føroyar somu meting sum árið fyri, ið er triðhægst á ratingstiganum (Aa2 við støðugum útliti), millum annað tí mett varð, at landskassaskuldin kann byrja at lækka aftur longu í 2021.

Yvirskipað tykist føroyski búskapurin at vera sloppin væl ígjøgnum fyrsta umfari av Covid-19. Húsarhaldini hava ikki biðið um skáa í størri mun, enn tey plaga, og størsti parturin av vinnuni hevur megnað at fóta sær við at nýta burturav egnari uppsparing og partvíst við at taka av tilboðnum um skáa frá bankunum. Enn eru útlitini óviss, men landskassin hevur við lántøkuni í juni 2020 tryggjað sær fígging tilhallið á fíggjarlógini fyri bæði 2020 og 2021.

Landsbanki Føroya *er ein óheftur almennur stovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti, tað vil siga einum tryggum fíggjarkervi og einum høgum kredittvirði í Føroyum.*